


teirra heimasíðum fara úr 300 vitjandi um vikuna til 2.500.

»Faroe Islands football« kemur eisini á fjóðra pláss, tá søkt verður eftir Føroyum um allan heim.

### Hvalaveiða vekjur áhuga

Google Trends vísur eisini hvørji orð, saman við »Faroe Islands«, vaksa mest. Tað er kanska ikki so stuttligur lesnaður, tí »Dolphins Faroe Islands« og »Faroe Islands dolphin« koma á pláss eitt og tvey.

– Vit hava eina heimasíðu www.whaling.fo, har vit sum best royna at greiða frá, hvat grindadráp gongur út uppá. Vit hava eisini ætlanir um at økja ta tænastuna fyri at steðga teimum, ið koma við pástandum um at grindadráp er til stuttleikar, at tað er ein manndómsroynd, og at vit drepa einar 400 hvalir um dagin, sigur Rói Magnussen á Ferðavinnuráðnum.

Ferðaráðið hevur ikki keypt nøkur leitiorð á Google enn, men umhugsar at gera tað. Tá er kanska eitt hugskot at keypa »Dolphin« og fáa fólk inn á føroysku »Whailing« síðuna.

– Vit hava tænastuna Google Analytics undir øllum okkara síðum, og síggja hvar fólk koma frá, hvussu leingi tey steðga á heimasíðuni, og hvat tey eru áhugað í. Streymurin inn á okkara síður er rættuliga góður, og tí hava vit ikki mett, at tað er neyðugt at keypa nøkur orð enn, greiður Rói Magnussen frá.

Síður sum oftaverða uppdateraðar, til dømis bloggar og tíðindasíður, koma høgt upp tá leitað verður í Google. Tað hava tey á Ferðaráðnum eisini merkt, tá tey høvdu nakrar bloggarir inni á síðuni.

– Vit eru eitt sindur aftanfyri í Føroyum, men bloggar og sosial media sum Facebook og Twitter er tað, ein skal satsa uppá framyvir, sigur Rói Magnussen.

*Tá ein leitar eftir »Faroe Islands« kemur »Dolphins« høgt upp*

**Søgninger i fremgang**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | dolphins faroe islands | Kraftig vækst |
| 2. | faroe islands dolphin | Kraftig vækst |
| 3. | faroe islands wiki | Kraftig vækst |
| 4. | wikipedia faroe islands | Kraftig vækst |
| 5. | scotland faroe islands | +250 % |
| 6. | weather faroe islands | +100 % |
| 7. | faroe islands ferry | +70 % |
| 8. | faroe islands airport | +60 % |
| 9. | faroe islands football | +60 % |
| 10. | faroe islands flights | +50 % |

Google Integrer denne tabel

**Weekendophold**

Weekend på Færøerne?
Romantisk sviptur til Nordatlantens perle. Fra 2.790,- inkl. hotel/fly!
Atlantic.fo/Weekendophold

{KeyWord:Weekendophold}
Oplev fantastiske Færøerne. Book weekendophold fra 2.790,- her!
Atlantic.fo/Weekendophold

| | |
|---|---|
| Hotel Færøerne | (Phrase) |
| Hotel Torshavn | (Phrase) |
| Hoteller Færøerne | (Phrase) |
| Hoteller Torshavn | (Phrase) |
| Hoteller i Torshavn | (Phrase) |
| Romantisk weekend Færøerne | (Phrase) |
| Romantisk weekend Torshavn | (Phrase) |
| Sviptur Færøerne | (Phrase) |
| Sviptur Torshavn | (Phrase) |
| romantisk weekend | (Phrase) |
| romantisk weekendophold | (Phrase) |

*Dømi uppá hvussu Atlantsflog keypur orð á Google, og síðani fær fólk inn á heimasíðuna*